

Tey trý skipini hjá Kjartani Joensen við bryggju í Leirvík fríggjadagin, trolbátarnir Norðleivur og Birtingur og útrórðarbáturin, Høvnin

Mynd: Vilmund Jacobsen

oya á Toftum.

Jógvan Martin Hansen vísir á, at tá tú rekur vinnu og hevur bæði virki og skip – við fólki í landi og umborð á bátunum – er ógvuliga umráðandi, at hesi verða rikin á marknaðarligum grundarlagi, so misstemningur ikki kemur í.

- Hetta er tað einasta rætta, tí tástaðni ført tú røttu myndina av gongdini, leggur virkisleiðarin aftrat.



*Áðrenn farið verður til hús, sita teir eina løtu í kaffistovuni og práta*

Mynd: Vilmund Jacobsen




# Jákup B og Helena landa í Klaksvík

**Jákup B hevur verið í Íslandi, meðan Helena hevur roynt í Eysturgrønlandi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík hevur kanska ikki verið mest at gjørt seinastu tíðina. Og tó; nakrir dagar hava verið við landingum, og okkurt er í væntu teir næstu dagarnar.

Í dag landar trolbáturin Jens Leon eini 19.000 pund í Klaksvík, og í morgin koma línuskipini, Jákup B og Helena, inn at landa.

Úr Klaksvík verður sagt, at meðan Jákup B hevur verið í Íslandi, hevur Helena roynt í Eysturgrønlandi.

- Tá vit frættu frá Jákupi B fríggjadagin, høvdu teir stívliga 60.000 pund, men høvdu nakrar dagar at royna í aftrat, áðrenn teir vendu stevninum hendanvegin aftur.

Sum skilst, hevur Jákup B serliga roynt eftir hýsu á hesum túrinum.

Pól Fuglø, landingarformaður, sigur, at Helena hevur eini 100.000 pund undan Eysturgrønlandi, og hjá teimum er meginparturin toskur.

- Helena hevur ikki selt sína veiði enn, men verður helst á Fiskamarknaðinum í morgin. Lítið er at ivast í, at teir fáa eina góða sølu.

Pól vísir á, at hevur tú eini 100.000 pund av toski á marknaðinum, selir tú gjarna fyri tað mesta av eini miljón krónum.

- Helena hevur gjørt einar 2-3 túrar undir Eysturgrønlandi á hvørjum ári seinastu árini. Hetta er kvota, sum føroyingar eiga har yviri.

Í síðstu viku løgdu eitt nú Navarin og Borgarin veiðina upp í Klaksvík, og tað gjørdu línuskipið Barið, fyrrverandi Sæborg, eisini.

- Teir, sum nú eiga Barið, eru nakrir av teimum, sum áður áttu Froyu. Skipið er nú heimahoyrandi í Haraldsundi, og Jógvan Pauli í Kongsstovu er ein av eigarunum.

Pól Fuglø heldur seg vita, at Nónhamar, sum annars hevur partrolað saman við Fjalshamri, hevur havt spælslaða, og at Fjalshamar ætlandi fer útaftur saman við Safir, nú Smaragd verður klassaður.